# Tilfeingisgjøld

Jógvan Sundstein skrivar í Sosialinum hósdagin 15. september, at
"Tey, ið tala fyri tilfeingisgjaldi, hava skyldu til at vísa nágreiniliga á, hvussuleiðis hetta skal krevjast inn, av hvørjum tað skal roknast, og hvat tað gevur landskassanum." Hann heldur fram, at "eisini má greiðast frá, um tað er eitt loypandi gjald, ella tað bert skal verða undir serligum umstøðum t.d. við sølu av skipi ella felag ella fiskidøgum v.m."
Eg skal bara vísa á, at alt hetta og meira aftrat er gjørt í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum frá januar 2000. Far inn á heimasíðuna hjá Búskaparráðnum, www.ecouncil.fo trýst á "Frágreiðingar" og síðan á "Várfrágreiðingin 2000". Ein nágreinilig viðgerð av tilfeingisgjaldi í fiskivinnuni finst á síðu 28 og fram í hesi frágreiðingini.
Øll, sum lesa frágreiðingina, vera heilt víst skjótt greið yvir, at kravið hjá Jógvani Sundstein um at "skilagóðir tankar um samfelagsbúskaparligar ábøtur liggja aftanfyri" er uppfylt í ríkiligt mát.
Góðan lestur.

Jóannes Jacobsen
Skrivari Búskaparráðsins